# Hvørt einasta húsfólk he




*- Mørkin skal vera eitt heim fyri húsfólkið, sigur Jona Dam, bólkaleiðari*

**- Hjartað hjá mær liggur hjá øllum hesum eldru fólkunum á heiminum. Tað er ótrúliga spennandi at arbeiða millum tey, sigur Jona Dam frá Norðskála. Hon starvast sum bólkaleiðari á røktarheiminum Mørkini á Streymnesi. – Hvørt einasta húsfólk hevur sína sjarmu, sigur hon**

SJÚKRASYSTIR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Streymnes:** - Fyri okkum er sera týdningarmikið at hava í huga, at hetta er ikki ein deild. Mørkin skal vera og er eitt heim – heimið hjá øllum hesum 32 húsfólkunum, slær Jona Dam fast, tá Sosialurin hittir hana á arbeiðsplássi sínum seinnapartin í gjár.

Mørkin er ætlað borgarum, sum ikki megna at búgva í egnum bústaði longur, og tí verður dentur lagdur á at munurin skal verða so lítil sum gjørligt millum heimið og røktarheimið.

Heimið er býtt sundur í fýra smáar eindir við átta húsfólkum í hvørjum. Á henda hátt eru skaptar umstøður fyri einum heimligum og livandi umhvørvi, har virðingin fyri tí einstaka er í hásæti.

Í roynd og veru var ikki neyðugt hjá Jonu ella nøkrum starvsfólki at siga tað beinleiðis, hvussu ein skipar hetta arbeiðið. Eingin sum kom á gátt á Mørkini í gjár kundi vera í iva um, at hetta ikki bert eru føgur orð, men veruleikin.

Longu tá tú kemur inn í gongina merkir tú tann heimliga angan av onkrum nýbakaðum. Tær íðnu kvinnurnar í køkinum hava bakað smákøkur i dagens anledning.

- Hesar smákøkurnar hvørva skjótt, sigur bólkaleiðarin við einum brosi.

## Tann gamla tíðin

Jona varð útlærd sum sjúkrasystir í 1996, og hevur arbeitt ymsastaðni, millum annað á Lágargarði og á D7 á Landssjúkrahúsinum. Síðani í mai mánaði 2006 hevur hon arbeitt her á Mørkini.

- Nú eri eg her hjá teimum gomlu. Og tað er faktiskt í hesum umhvørvinum at mær dámar best at arbeiða.

- Tað er sera áhugavert at arbeiða við teimum. Tey hava øll eina lívssøgu at siga frá og tey minnast ótrúliga væl frá teirri gomlu tíðini, sigur Jona Dam.

Hjá teimum, ið ikki minnast so væl verður dentur lagdur á at vísa teimum myndir og annað frá teirri gomlu tíðini. Á øllum veggjunum hanga tískil myndir frá økinum í Norðstreymoy og har í nánd, soleiðis at tann heimligi hugnin eisini kann verða varðveittur her á røktarheiminum.

## Fingur á pulsinum

Jona er bólkaleiðari fyri tvær av eindunum á Mørkini, og arbeiðir niðursetta tíð, soleiðis at hon hevur frí ein gerandisdag um vikuna.

Ein vanligur gerandisdagur hjá henni byrjar kl. 8 á morgni. Tá seta hon og hini starvsfólkini seg saman at tosa um støðuna hjá tí einstaka húsfólkinum á eindini, og hvat hesin dagurin hevur av avbjóðingum og uppgávum. Eftir tað, verða dagsins uppgávur býttar út millum starvsfólkini.

- Tað góða við teimum er, at tær eftirhondini hava so góðar royndir, at tær vita akkurát hvat tær skulu gera. So hetta gongur mestsum av sær sjálvum, greiðir Jona frá.

Hóast Jona virkar sum bólkaleiðari roynir hon eisini at vera við í røktini. Á henda hátt kann hon – bókstaviliga! – hava fingurin á pulsinum hjá tí einstaka húsfólkinum.

Dagurin í gjár, tá Sosialurin vitjaði á Mørkini, líktist mongum av teimum undanfarnu. Tó var kortini ein broyting, tí ein nýggj uppgáva lá fyri framman: At seta eitt nýtt starvsfólk inn í arbeiðið í eindini.

Hetta arbeiðið fevndi millum annað um at vísa, hvussu cardex-skipanin virkar, hvussu klokkuskipanin er og annars vísa til allar mannagongdir á heiminum, soleiðis at hon er tilbúgvin at fara til arbeiðis í morgun.

## Børnini vitja

Millum tær ymisku uppgávurnar sum vóru á skránni í gjár var enn ein vitjan – hesaferð av børnum úr barnagarðinum í Hvalvík.

Røktarheimið hevur nevniliga eina skipan um regluliga vitjan av barnagarðinum og frítíðarskúlanum, soleiðis at børnini vitja á heiminum aðruhvørja viku.

- Tað eru tey somu børnini sum koma aftur og aftur, og tey byrja nú at kenna húsið og húsfólkið – og tey eldru at kenna tey.

- Børnini eru sera áhugað í at práta við tey gomlu, so eg haldi, at hetta er ein sera góð skipan, har báðir partar fáa nakað burtur úr, sigur Jona Dam.

Tá henda vitjanin var at enda komin og børnini vóru farin avstað aftur, var klokkan farin at nærkast middegi. Døgurðin var tá í pottinum og skuldi setast á borðið hvørja løtu.

## Í friði og náðum

Hetta er ein løta sum húsfólkið gleðir seg til, - hesa løtuna har møguleiki er hjá teimum átta fólkunum á hvørji deild at sita saman og hugna sær undir máltíðini, júst sum heima við hús.

- Vit gera nógv at sita í friði og náðum saman við teimum og eta. Her royna vit ikki at fara frá borðinum, fyrrenn alt er yvirstaðið. Hetta kann gott taka sína tíð, men tað er líkamikið fyri okkum.

- Okkara hægsta ynski er, at hetta skal vera ein góð og hugnalig løta fyri okkum øll, greiðir Jona Dam frá.